## FCK aftur á slóðina

Eftir skuffandi javnleikin seinasta vikuskiftið, kom FCK aftur á slóðina um vikuskiftið, tá ið teir settu AC Horsens uppá pláss. FCK kom best frá byrjan, og eftir seks minuttir skallaði Jesper Grønkjær favorittarnir á odda. Teir gulu úr Horsens fingu tó javnað, tá ið Charles Akonnor í 24. minutti skoraði til hálvleiksstøðuna, 1-1.
Annar hálvleikur var ikki meir enn byrjaður, tá ið Hjalte Bo Nørregaard hevði lagt FCK á odda. Hereftir høvdu teir skil á dystinum, og stutt fyri leiklok avgjørdi Jesper Grønkjær dystin, tá ið hann skoraði til endaliga úrslitið, 3-1.




## United á meistarakós

Tá ið ein tími var spældur av dystinum millum Manchester United og Blackburn, var Blackburn á odda 1-0. Men so kom gongd á oddaliðið í Premier League. Paul Scholes javnaði, og síðani skoraðu Michael Carrick, Ji-Sung Park og Ole-Gunnar Solskjær. United vann sostatt 4-1.
Við sigrinum heldur United fæst um oddastøðuna og er framvegis seks stig frammanfyri næstfremsta liðið, Chelsea.

*GÍ*

*EB/Streymur*

VB/Sumba – AB 1-0 (0-0):

# Vágbingar vunnu vánaligan dyst

**Gypparí og vindur er ikki heimsins besta cocktail. Tað mugu bæði leikarar og áskoðarar í Suðuroy ásanna, eftir at VB/Sumba og AB spældu ársins fyrsta Formula-dyst í Vági. Veruligt fótbóltsspæl sást ongantíð, men suðuroyingar høvdu viljan**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*




*VB/Sumba fekk góða byrjan við trimum stigum í fyrsta umfarinum*
*Mynd: Bjartur Joensen*

Tey munnu vera fá í ivast í, at VB/Sumba og AB fara at liggja og stríðast um í tyngra endanum á stigatalvuni í ár. Og at stríðast verður helst lyklaorð teirra, um teimum skal vera lív laga í bestu deildini komandi ár. Veruleikin er tann, at hesi bæði liðini ikki hava sama fólk at taka av sum fleiri av hinum liðunum, og at spæla mótstøðuliðini sundur og saman fyri at sigra, er ikki gongda leið teirra. Stríðast má fyri hvørjum bólti, soleiðis at møgulig stig kunnu fáast til vega. Hetta gjørdi VB/Sumba sunnudagin, meðan einki riggaði hjá AB – heldur ikki at stríðast.

### Hart skot gav trý stig

Argjamenn høvdu vindin ímóti sær í fyrra hálvleiki, og tað gjørdi tað trupult hjá teimum at spæla. Suðuroyingar fingu heldur ikki spælið at koyra, men royndu seg við langum bóltum niðan í álopið, sum heldur ikki riggaði serliga væl.

Seinni hálvleikur var lítið frægari í so máta. Fótbóltsspæl var eitt fremmandaorð á vøllinum, og hóast viðhaldsfólkini hjá liðunum báðum neyvan høvdu væntað sær sambafótbólt, so vóru tey helst vónbrotin av spælinum á vøllinum.

Men millum vind og vánaligt spæl vóru inn í millum nakrir kjansir. Millum annað rakti AB einaferð stongina, og tvær ferðir varð bólturin bjargaður á sjálvari mállinjuni hjá VB/Sumba.

VB/Sumba hevði eisini onkrar naskar royndir, og hálvan tíma fyri leiklok bragdaði hjá teimum.

Bólturin varð fluttur upp í høgra borði og lagdur tvørtur um til John Poulsen. Hesin tók bóltin niður við bringuni, legði aftur til Jón Krosslá Poulsen, sum høgdi til. Magnus Poulsen fekk hondina á, men megnaði ikki at halda harða skotinum.

### Niður á jørðina

AB royndi at svara aftur, men hetta eydnaðist ikki. Eftir fantastisku byrjanina upp á árið við sigrinum á B36 í steypakappingini, komu argjamenn so væl og virðiliga á jørðina aftur nú. Hóast talan er um fyrsta landskappingardystin í ár, so kunnu mistu stigini í gjár vísa seg at vera rættiliga avgerandi í síðsta enda, og somuleiðis kunnu stigini, sum VB/Sumba fekk vera bjargingin, tá 27. dystur er spældur.

# Besta byrjanin í fimm ár

– Hetta er besta byrjanin, vit hava fingið í fimm ár, sigur fegni málskjúttin, Jón Krosslá Poulsen. Undanfarnu fýra árini hevur VB/Sumba tapt fyrsta landskappingardystin, men í gjár vunnu teir á AB.
– Sigurin var fult uppiborin og vit vóru klárt betri. Eg haldi vit vóru meiri uppsettir og høvdu eisini meiri vilja, sigur Jón Krosslá Poulsen.
Hann ásannar, at dysturin móti argjamonnum ikki var teirra besti, men stigini eru væl tað, sum telja í síðsta enda.
– Tað var øgiliga týdningarmikið at fáa stig burtur úr hesum dystinum, har tað var nógv gypparí í fyrra hálvleiki, meðan seinni hálvleikur var betri, metir Jón Krosslá Poulsen.

***-rwd***

## – Hatta var ikki planurin

**– Tað vit kunnu brúka hetta til, er, at spæla vit væl, so kunnu vit vinna á teimum bestu, men um vit ikki gera tað, so kunnu vit tapa fyri øllum, sigur Jákup Martin Joensen, liðformaður hjá AB**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Jákup Martin Joensen, liðformaður hjá AB, var ógvuliga vónbrotin eftir tapið fyri suðuroyingum í gjár.

– Hatta var avgjørt ikki planurin. VB/Sumba verður nokk ikki liðið sum vinnur FM í ár, so vit fóru til Suðuroyar eftir øllum stigunum, men verða nú noyddir at taka tey aðrastaðni frá, sigur eiðismaðurin hjá AB.

– Vit vóru sum so væl nøgdir, tá vit fóru í hálvleik. Vit høvdu havt vindin ímóti okkum, tað darvaði nógv og vit skuldu bara koma ígjøgnum fyrra hálvleik, og ætlaðu so at fáa spælið at koyra í seinna hálvleiki, men tá riggaði einki.

Annars heldur liðformaðurin hjá AB, at talan var um ein vánaligan fótbóltsdyst.

– Tað var vánaligur fótbóltur í Vági og bólturin var ongantíð. VB/Sumba royndi ikki at spæla bólt, men koyrdu upp á langar bóltar og fysikk. Vit royndu at spæla men tað riggaði als ikki, sigur Jákup Martin Joensen, sum endar viðmerking sína soleiðis.

– Tað vit kunnu brúka hetta til, er, at spæla vit væl, so kunnu vit vinna á teimum bestu, men um vit ikki gera tað, so kunnu vit tapa fyri øllum, sigur Jákup Martin Joensen.